# Tróndardagarnir í Gøtu

**Átta eru Tróndardagarnir. Hvør hevur sítt, men samanlagt hava teir alt, sum skal til at gleða stór og smá, leik og lærd. Saman verður leitað aftur til upprunan og fram um nútíðina. Fyrstu seks Tróndardagarnar verður ljós á ymiskan hátt kastað á søgu og søgn, og teir báðar síðstu verður gleði og gleimur við tónlist og leiki siga fyrireikararnir í skrivi**



*Tróndardagarnir verða settir í Norðragøtu leygardagin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### 1. Tróndardagur

Fyrsti Tróndardagur verður sannur hátíðardagur í Gøtu. Loksins verður standmynd reist til minnis um mætasta høvding føroyinga Trónd í Gøtu. Talan er um prýðiliga standmynd eftir mæta føroyska listarmannin Hans Paula Olsen. Á hesum degi savnast øll um standmyndina klokkan 14.

Ikki nokk við at Tróndur fær eina standmynd reista. Tróndur verður eisini heiðraður í Gøtu kirkju har nýskrivað tónlistarverk eftir bretan Gavin Bryars verður framført av Aldubáruni, Eivør Pálsdóttir, Rúna Brattaberg og Eystanljóði.

### 2. Tróndardagur

Annan Tróndardag halda hátíðarhaldini fram. Gjáarneystið í Norðragøtu kemur aftur til heiður og æru. Gøtu Fornminnissavn hevur umvælt og víðkað savnið við at hýsa bátum og øðrum, sum hevur við hav og fiskiskap at gera.

Fróðarmaðurin Sigfríður Joensen letur 2. Tróndardag stórfingið bókaverk um Gøtuskeggjarnar úr hondum. Talan er um forkunnugt verk við hópin at myndum, spennandi tulkingum og góðum frásagnum.

Dagurin byrjar í Nýggju kirkju við guðstænastu og endar í Gomlu kirkju við guðstænastu.

### 3. Tróndardagur

Á triðja Tróndardegi ber til at fáa frásagnir bæði uttandura og innandura. Søgutúrurin av Toftanes í Leirvík um Bønhústoft til Blásastova í Gøtu verður gingin við ferðaleiðara, og um kvøldið verður frásøgn um arbeiðið at skriva Gøtu húsasøgu. Samstundis letur framsýning upp í Glyvra-Hanusar Húsi, ið lýsir hetta arbeiði.

Hendan dag ber eisini til hjá tónleikaáhugaðum at leita sær aftur í tíðina á tónleikaseminarinum »Tónleikur fyri 1000 árum síðani«.

### 4. Tróndardagur

Á fjórða Tróndardegi verður Tróndarseminar fyriskipað fyri leik og lærd søgufólk í Gøtu skúla. Tróndur, Føroyingasøga, fornfrøðisligar rannsóknir og søga føroyinga sum heild verður viðgjørd av írum, íslendingum, dønum og føroyingum. Øll hava møguleika at geva sítt íkast.

Eins og hinar dagarnar er møguleiki at vitja framsýningarnar í Blásastovu, í Gjáarneystinum, í Glyvra-Hanusar Húsi og forkunnugu myndaframsýningina hjá MOMO í Tróndargøtu 37.

### 5. Tróndardagur

Á fimta Tróndardegi verður forkunnug konsert í Gomlu kirkju við kingosangi og frásagnum. Í upprunaligum umhvørvi er møguleiki at uppliva hendan tónleik fáa nýtt lív.

Søvn og framsýningar hava eisini opið allan seinnapartin undan konsertini, so her er veruliga eitt gott høvi at leita sær aftur í tíðina, áðrenn farið verður í kirkjuna til forkunnugu tónarnar frá Tjørnuvíkingum og Kára Sverrissyni.

### 6. Tróndardagur

Á sætta Tróndardegi eru framsýningar og søvn opin eins og filmurin um listarmannin



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður heldur røðu*





*Eivør Pálsdóttur og Rúni Brattaberg fara at framføra á Tróndardøgunum*



*Jógvan Fríðriksson, bispur heldur røðu*



*Hans Pauli Olsen hevur gjørt standmynd av Trónda í Gøtu*